## Iran vil tosa um frið

Iran er til reiðar at styðja palestinska fólkið, um palestinar semjast við ísraelsmenn um eina skipan, sum gevur pørtunum hvør sítt ríki. Tað sigur iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, hóast hann fyri stuttum mælti øllum til at rudda Ísrael av heimskortinum, og hóast hann í síðstu viku legði Barrack Obama, forseta undir at styðja ísraelska hópdrápið í Gaza, sum hann orøfurdi seg. Í samrøðu við amerikanska sjónvarpið ABC sigur forsetin, at Iran er til reiðar at góðtaka ta loysn, sum palestinar velja. Hann nevnir tó einki um, at Iran so fer at viðurkenna Ísrael.



## Svínasóttin ikki so álvarssom

Teir flestu meksikanararnir, sum fingu svínasótt, eru nú frískir og eru slopnir av sjúkrahúsunum, sigur meksikanski forsetin. Felipe Calderon, forseti, segði í gjárkvøldið, at meiri enn 800 fólk hava fingið at vita frá læknunum, at tey eru frísk nú, og umleið 400 verða kannað í løtuni fyri at fáa staðfest, um tey eru smittað. Í gjár varð sagt,at smittan longu staðfest í USA, Kanada og Ný Sælandi, og at myndugleikarnir í Spania og Fraklandi kannaðu, um smittan eisini var komin hagar. Meksikanar í milliónatali hava hildið seg innandura, eftir at tað kom fram, at svínasóttin hevur kravt 81 mannalív har. Felipe Calderon, forseti, vissaði í gjárkvøldið meksikanska fólkið um, at sjúkan kann lekjast við heilivági, og hann segði, at myndugleikarnir hava nóg mikið av heilivági á goymslu.



*Eitt flogferðafólk úr Meksiko ber eina andlitsmasku yvir munnin, tá hon kemur í floghavnina í Barcelona. Sponsku heilsumyndugleikarnir hava í dag staðfest fyrsta tilburðin av svínakrími í Evropa. Talan er eftir øllum at døma um ein mann, ið fyri kortum er komin heimaftur eftir eina ferð í Meksiko. 17 aðrir sjúklingar við líknandi sjúkueyðkennum verða hildnir undir eftirliti, skriva AFP og Ritzau. Heilsumyndugleikar kring allan heimin eru á varðhaldi eftir útbrotið av svínakrími í Meksiko.*

*Mynd: Manu Fernandez/AP/POLFOTO*

### Soleiðis uppstóð svínakrím




### Heimsfarsóttarstigin

Heimsheilsustovnurin WHO nýtir eina seks stiga ávaringarskipan til at meta og ávara um farsóttir (stig 1 – 5), fram til eina veruliga heimsfarsótt (stig 6)

STIG 1 Lítil smittuvandi millum menniskju

STIG 2 Øktur smittuvandi millum menniskju

STIG 3 Eingin ella lítil smitta millum menniskju

STIG 4 Vaksandi smitta millum menniskju

STIG 5 Stór smitta millum menniskju

HEIMSFARSÓTT

STIG 6 Áhaldandi og útbreidd smitta millum menniskju

Kelda: WHO /ritzau grafik/ MW

# Til reiðar at taka móti svínakrími

**- Er talan um eina heimsfarsótt, og at kemur hon henda vegin, eru vit klár at taka móti henni, vissar landslæknin, Høgni Debes Joensen, um. Heimurin stendur upp eftir einum enda, nú svínakrím er staðfest sum heimsfarsótt, og hevur sigst hava dripið í minsta lagi 103 meksikanarar**

HEIMSFARSÓTT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Heimsheilsustovnurin hevur hækkað tilbúgvingarstøðið til stig 3 á tilbúgvingarstiganum *(sí stigan á síðuni)*, eftir at svínakrím er brotið út í Meksiko og USA.

Meksiko tykist vera miðdepilin fyri útbrotið, og upp til 103 fólk eru higartil hildin at verða deyð av sjúkuni í Meksiko. Harafturat eru higartil 1614 tilburðir meldaðir ymsastaðni í Meksiko. Tó eru bert 18 tilburðir staðfestir á royndarstovum og meldaðir til Heimsheilsustovnin hjá ST, WHO.

20 fólk hava eisini fingið staðfest sjúkuna í USA, men eingin av teimum 20 fólkunum eru deyð, og bert ein av teimum varð innlagdur eitt stutt tíðarbil. Í USA er tilbúgvingin hækkað, og eru fyrireikingarnar til eina møguliga heimsfarsótt settar í gongd, eftir at teir 20 tilburðirnir vóru staðfestir á royndarstovum í Kanada.

Russland hevur banna øllum innflutningi av kjøti úr Meksiko, og suðurstatunum í USA, og sigur, at tað fer at kanna øll innkomandi ferðafólk úr teimum báðum londunum fyri svínakrím. Eisini Kina hevur tikið líknandi stig við at banna innflutningi av kjøti úr Meksiko og suðurstatunum í USA.

### Vit eru klár

Hóast Føroyar kunnu tykjast verða ógvuliga isoleraðar, her vit liggja mitt í Norðuratlantshavi, eru myndugleikarnir til reiðar at taka móti eini heimsfarsótt, skuldi ein slík stungið seg upp.

Eftir at útbrotið av fuglakrími skapti ótta um allan heimin fyri fáum árum síðani, kravdi landsstýrismaðurin í Heilsumálum, Hans Pauli Strøm, at ein tilbúgvingarætlan varð gjørd fyri Føroyar.

Henda tilbúgvingarætlanin er liðug, og í tí sambandi skuldi eisini keypast inn av antiviralum evnum, ið kunnu basa teimum virusunum, ið eru mest sannlíka at menna seg til heimsfarsóttir.

- Vit hava eitt nøktandi lagur av trimum sløgum av antiviralum evnum, og vit eru før fyri at basa eini slíkari sjúku, skuldi hon komið hendavegin, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari.

- Tó antiviralu evnini kunnu basa sjúkunu, er tað einasta sum veruliga hjálpir koppseting. Har hava vit eina avtalu við eina fyritøku, har vit hava keypt okkum ein garanti fyri at teir framleiða vaccinuna til okkum. Men í verandi løtu er tað mest umráðandi at sláa kalt vatn í blóðið, tó uttan at vera líkasælur, staðfestir Heri Mørkøre, landsapotekari.

### Kallar pandemibólkin saman

Landslæknin, Høgni Debes Joensen, fylgir eisini væl við støðuni, so hvørt hon broytist. Men í verandi løtu sær hann onga orsøk til ótta.

- Vit hava eina tilbúgvingarætlan fyri Føroyar, skuldi ein heimsfarsótt stungið seg upp, og henni fylgja vit, sigur hann.

Henda tilbúgvingarætlanin verður sett í verk í somu løtu heimsheilsustovnurin WTO meldar út at talan er um eina heimsfarsótt. Sambært tilbúgvingarætlanini er ein varandi pandemibólkur settur, og hann verður kallaður inn til fund at viðgerða støðuna.

- Eg fari nú at kalla henda bólkin saman, og eg rokni við at tað verður hósdagin, at vit hittast til henda fundin, sigur Høgni Debes Joensen, landslækni, sum eisini vissar um, at skuldi ein heimsfarsótt komið hendavegin, so eru vit til reiðar at taka móti henni.

## Svínakrím komið til Evropa

**Tíðliga mánamorgunin varð fyrsti tilburðurin av svínakrími staðfestur í Spania, og er svínakrímið tískil komið til Evropa. Í Danmark eru fýra fólk sett í karantenu, meðan royndir av blóðinum verða kannaðar**

HEIMSFARSÓTT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í Spania eru seks fólk, øll komin aftur úr Meksiko fyri stuttari tíð síðan, sett í karantenu á sjúkrahúsum. Royndir á royndarstovu staðfestu, at ein av tilburðunum varð positivur fyri svínakrímið. Í Danmark eru fýra fólk hildin aftur, meðan blóðroyndir av teimum verða kannaðar á royndarstovu.

Svínakrímið, ið er ein influensa av slagnum H1N1 er vanlig millum svín. Tá influensan breiðir seg frá fólki til fólk, heldur enn frá djóri til fólk, kann tað halda áfram at mutera og ger tað sjúkuna verri at basa.

Sjúkueyðkenni fyri svínakrím eru eitt nú fepur, manglandi matarlystur, hosti, snoran, eymur hálsur, vaml, spýggjan og diarré siga heilsumyndugleikarnir í USA, CDC.

Árliga doyggja millum 250.000 og 500.000 fólk av influensu. Men tað, ið ræðir myndugleikarnar er, at ein nýggjur tráður av virus kann breiðast skjótt, orsakað av at fólk ikki hava náttúrligu verjuna, og at vaccinur kunnu taka upp til mánaðir at framleiða.

Í øllum førum tríggjar heimsfarsóttir vóru farnu øld. Í 1918 doyðu okkurt um 50 milliónir fólk av »Sponsku sjúku«. Í 1957 til 1958 var tað asiatiskt beinkrím, og í 1968 til 1969 doyðu okkurt um ein millión fólk av Hong Kong-beinkrími.